# LÍTIL ÁBÓT KANN

**HITAMYNDIR – Eg má bara vera heilt erligur og siga við teg, at tað er alt ov nógvur gjóstur í húsinum. Hetta ger, at tú brúkar óneyðuga nógvan pening í olju. Men ver tú bara róligur, tí eg havi sæð tað sum var verri enn hetta, sigur Baldvin Harðarson frá fyritøkuni Hitamyndir. Hann hevur júst vitjað hjá einum kunda, og hevur staðfest at húsini eru væl bygd, men at ov nógvur hiti lekur út. – Tú kanst saktans minka nógv um oljurokningina, um tú bara brúkar ein 50 krónuseðil.**

Orð&myndir: Snorri Brend



**SPARA**

*Nógvur peningur er nýttur til at útvega røttu útgerðina, men nú er Baldvin til reiðar við tilboði sínum at finna hita-lekar hjá fólki. - Tað er skjótt at spara peningin innaftur, sigur hann*

**Havn:** Gongin er á tremur við alskyns tólum, nú Baldvin hevur riggað til eina kanning av hitaleka í einum sethúsum:

Úthurðin er opin, men í hennara stað er sett ein dúkur við einum holi í. Her stendur ein ovurstórur blásari, og sum aftur hevur samband við eina teldu og eitt mátitól. Blásarin togar luft úr bygninginum og skapar soleiðis eitt undirtrýst innanveggja.

## » Er tað ikki bara at taka eina einstaka mynd, og so er tað liðugt?

Baldvin fer yvir til telduna, setir inn upplýsingar um umráðið ið skal kannast, umhvørvi, fermetratal og annars alt frá innihita til viðkomandi upplýsingar frá veðurfrøðingum. Hann trýstir síðan á nakrar knøttar og í somu løtu tendrar viftan. Tað er týðiligt, at hetta er eitt arbeiði sum Baldvini dámar sera væl.

– Nú skal eg bara finna rætta mátið, so kann eg byrja at taka myndirnar. Tær fara at vísa, um húsini eru ótøtt og um tað er gjóstur onkustaðni í húsinum, sigur Baldvin, ikki sørt spentur á málinum.

Hann fer niður í eina tasku og upp kemur ein video-upptakari til infra-reyðar upptøkur, tað vil siga ein, sum er serliga ætlaður til av vísa á og prógva ótættleika í húsinum.

Fyrimunurin við hesum upptøkum er, at ein kann finna hita-lekar í sjálvt teimum best bjálvaðu húsunum.

– Alt verður gjørt fyri at vísa kundanum á, hvar ábøtur mugu og skulu gerast fyri at spara pening til orku, og samstundis samfelagið fyri útlát, vísir Baldvin á.

Hann hevur nomið sær útbúgving sum thermografur í Danmark, í fjør, og hevur longu staðfest fleiri hitalekar í føroyskum húsum.

### Hervilig høgætt

Vit eru støðd hjá einum kunda, sum hevur frætt um møguleikan at taka hitamyndir hjá fyritøkuni Hitamyndir, sum hevur heimstað í Sørvági.

Støðan er hon, at maðurin í húsinum heldur, at oljurokningin er í størra lagi og at oljubilurin vitjar oftari enn neyðugt í túni hansara.

– Tá hann ringdi til mín segði hann við meg, at tað tóktist sum at tað var ov nógvur gjóstur inni í húsinum, serliga kring um vindeyguni og úthurðina.

– Ja, hesin kundin helt skemtandi fyri, at tá høgættin stóð á framsíðuna á húsunum, var tað næstan so, at hann ikki behøvdist at tendra fyri ventilasjónini, greiðir Baldvin frá.

Nú er hann møttur upp hjá kundanum, og í gongini er alt gjørt til reiðar at útføra eina grundiga kanning, og møguliga ávísa um kundin hevur rætt í illgruna sínum.

### Finna feilin

Blásarin hevur verið í gongd eina løtu, og nú er klárt at fara undir prófførsluna. Tað skapta undirtrýstið ger sítt til, at køld luft kemur inn í húsini, um húsini eru ótøtt. Tað verður bæði kannað við undirtrýsti og yvirtrýsti. Og soleiðis kemur ein fram til eitt úrslit.

Við upptøkutóli sínum gongur

## » Uttan fyri eru 8 stig, men her í stovuvindeyganum eru bert 10,3 stig og 22,1 stig uppi undir loftinum. So tú skilir, at her mást tú gera okkurt við bjálvingina rundan um vindeyguni

hann rúm úr rúmi og avmyndar loft, listar, karmar, spotlight, hurðar og øll onnur hugsandi støð, har ein hitaleki kann vera.

Maðurin í húsinum fylgir væl við arbeiðinum hjá Baldvini, og spyr eisini viðkomandi spurningar út frá vitan síni innan timburarbeiði. Fyri hann ger tað einki, um tað tekur sína tíð, tí kanningin er ikki tímalønt.

- Onkur hevur spurt meg, um tað ikki er eitt lætt arbeiði sum eg havi. "Er tað ikki bara at taka eina einstaka mynd, og so er tað liðugt?", spyrja fólk meg. Men tit síggja, at tað skal gerast ordiligt. Og tí kann tað lættliga taka sína tíð, áðrenn ein kemur fram til tað besta úrslitið fyri kundan, staðfestir Baldvin.

Kanningin á staðnum er bert ein partur av arbeiðinum, tí størsti parturin er at avlesa tøl og myndir, og soleiðis kemur ein fram til hvar feilurin er.

- Tá tað so er liðugt, hava vit eisini eitt gott støði at tosa út frá, staðfestir Baldvin.

### Hitaleki

Baldvin er nú komin fram til eitt av vindeygunum í stovuni. Hann steðgar á eina løtu, og skrúvar síðani hugsunarsamur á ein knøtt á upptøkutólinum.

– Hetta sær ikki gott út, sigur hann og vendir sær ímóti kundanum. – Her er nakað heilt galið.

Hann vísir kundanum skíggjan, og her sæst svart uppá hvítt – ella blátt uppá gult – hvussu stórur hitalekin í roynd og veru er: Uttan fyri eru 8 stig, men her í stovuvindeyganum eru bert 10,3 stig og 22,1 stig uppi undir loftinum.

– So tú skilir, at her mást tú gera okkurt við bjálvingina rundan um vindeyguni. Tú betalir faktist alt for nógv í olju, slær Baldvin fast.

– Í mongum førum kann kundin sjálvur gera nakað fyri at bøta um hita-lekan. Ein slík ábót nýtist ikki at kosta so øgiliga nógv, men ein fær skjótt spart peningin innaftur!

snorri@sosialurin.fo

## 6,98 sekundlitrar

*Eftir at Baldvin Harðarson hevði kannað húsini fekk kundin eina frágreiðing og úrslit av kanningini, har viðheft var eitt tilmæli um ábøtur. Saman við frágreiðingini verða vístar myndir av nøkrum støðum runt um í húsinum, har ein serliga væl sær, hvussu stórur hitalekin er. Í tølum er hann 6,98 sekundlitrar fyri hvønn fermeturin, meðan hann skal vera 1,5 sek/l. Víst verður á, at húsini yvirhøvur eru væl gjørd og at mistøkini eru smá, men at væl slepst til at gera tær tilmæltu ábøturnar. Í frágreiðingini er eitt tilmæli um, hvussu kundin sjálvur kann bøta nógv um hita-lekarnar. Ja, ofta kann sjálvt ein skrivstovumús útføra tað, fyri lítið og lætt.*